SEV

# Maskinmeistari
## søkist til Elfelagið SEV

Eitt farloyvisstarv fyri maskinmeistara við elverkið á Strond í Klaksvík er leyst at søkja til setan í tíðarskeiðnum 1. januar til 31. desember 2008.

**Starvsinnihald**
Starvið umfatar rakstur og hald av elverkinum á Strond, viðlíkahald av mobilagrigatum, eins og viðlíkahald av teim fimm smáverkunum á Fugloynni, í Mykinesi, á Skúvoynni, Kolturi og Stóra Dímun, ið tilsamans hava 14 framleiðslueindir. Hartil eru 3 eykaverk, sum eisini hoyra til starvsøki.

Talan er fyrst og fremst um dagarbeiði, men talan kann blíva um nakað av vaktararbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

**Arbeiðsstaður**
Arbeiðsstaðið er á elverkinum á Strond, og arbeitt verður á og út frá hesum arbeiðsstaði til hini elverkini eftir tørvi.

**Førleikakrøv**
Tað er ein fyrimunur um tú hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv og/ella royndir innan øki.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið. Er talan um fulla maskinmeistaraútbúgving er starvið flokkað í lønarflokki 6. Byrjunar- og endalønin í 6. lønarflokki er í løtuni netto ávikavíst kr. 25.624,38 og kr. 27.403,85 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavíst kr. 3.203,05 og kr. 3.425,48 um mánaðin.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan, sum verður roknaður frá próvtøkudegnum, men er treytaður av fakliga viðkomandi arbeiði síðani tá.

Fólk í tíðaravmarkaðum størvum sum hesum kunnu velja at fáa eftirlønargjaldið útgoldið sum A-inntøka.

**Umsóknir**
Vinaliga send umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum til:

*Elfelagið SEV*
*Postrúm 319*
*110 Tórshavn*

Umsóknarfreistin er týsdagin 4. desember 2007.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hans Jákup Petersen, verkmeistara ella til Berg Didriksen, deildarstjóra á maskindeildini, báðir á telefon nr. 346800.



Sosialurin -har tað hendir



Mentamálaráðið
YRKISDEPILIN

## SKRIVSTOVUFÓLK

**Starvið**
Av tí at skrivstovufólk okkara hevur valt at taka við øðrum avbjóðingum í Yrkisdeplinum, er eitt áhugavert og fjølbroytt fulltíðarstarv sum skrivstovufólk leyst at søkja í Yrkisdeplinum við møguleikum fyri fakligari og persónligari menning við skiftandi uppgávum.

**Arbeiðsøki**
Í høvuðsheitum at arbeiða við øllum vanligum fyrisitingarligum uppgávum og at hava skrivligt og munnligt samskifti við viðskiftafólk, t.e. lærupláss, lærlingar, yrkisskúlar, yrkisnevndir og onnur innan arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarøkið.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum, at umsøkjari:
- Hevur handilsskúlaútbúgving og royndir í skrivstovuyrkinum ella aðra javnsetta útbúgving og royndir,
- hevur góðan teldukunnleika og kunnleika til mál, serliga føroyskt, og
- hevur góð samstarvsevni og førleika at arbeiða sjálvstøðugt.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.
Setanarøkið fevnir um alt stjórnarráðið og tess stovnar.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

Yrkisdepilin
Postrúm 3279
FO-110, Tórshavn

ella sum teldupostur til: eydung@yrkisdepilin.fo

Umsóknir skulu vera Yrkisdeplinum í hendi í seinasta lagi 19. november 2007, kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Upplýsingar um virksemið hjá Yrkisdeplinum eru at finna á heimasíðuni: www.yrkisdepilin.fo

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Eyðun Gaard, fyrisitingarleiðara, tlf. 555066.

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt fyrisitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Yrkisdepilin** er ein sjálvstøðug fyrisiting í Mentamálaráðnum, sum fyrisitur arbeiðsmarknaðar- og yrkisútbúgvingarmál, herundir at vera fyrisiting hjá Yrkisútbúgvingarráðnum og yrkisnevndunum. Yrkisdepilin fyrisitur eisini ávís viðkomandi málsøki fyri Mentamálaráðið, herundir at avgreiða ferða- og lønarendurgjald til lærupláss o.l.



## Lærlingur til Ítróttur á Glyvrum
INTERSPORT

**Søkt verður eftir lærlingi til Ítrótt á Glyvrum**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar. Umframt handilin í Glyvrum hava vit eisini ein í Tórshavn og ein í Klaksvík.

So ert tú ein fryntligur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur ert tú vælkomin at søkja hetta lærupláss. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:

***Ítróttur á Glyvrum***
***Glyvrarvegur***
***FO-625 Glyvrar***

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR
Niels Finsensgøta 5 · boks 268 · FO-110 Tórshavn



## Lærlingur til Thomas Dam
INTERSPORT
Tórshavn

**Søkt verður eftir lærlingi til Thomas Dam ítrótt í Tórshavn.**

Starvið fevnir um alt vanligt handilsarbeiði innan sølu av ítróttarútgerð. So ert tú ein m/k, sum hevur áhuga innan hetta økið, kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð hjá okkum

Thomas Dam Ítróttur er partur av Intersport- og Sport Direct samtakinum og hava vit 3 ítróttarhandlar. Umframt handilin í Tórshavn hava vit eisini ein á Glyvrum og ein í Klaksvík.

So ert tú ein fryntlig/ ur persónur við áræði og ikki ert bangin fyri at taka eina eyka hond í, tá á stendur, ert tú vælkomin at søkja hetta lærupláss. Lærutíðin er 2 ár við HH prógvi og 3 ár við FHS prógvi.

Umsóknir við prógvum og viðmælum verða at senda til:

***Thomas Dam Ítróttur***
***Niels Finsensgøta 5***
***Boks 268***
***FO-110 Tórshavn***

P/F THOMAS DAM ÍTRÓTTUR
Niels Finsensgøta 5 · boks 268 · FO-110 Tórshavn